Ítróttar
Sosialurin
Nr. 85 • mikudagur • 3. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jón Rói livir í óvissuni

**Tað ganga nakrir dagar, áðrenn Jón Rói Jacobsen veit hvussu støðan er við knænum, sum hann aftur hevur fingið skaða í. Í ringasta føri kann verða neyðugt við nýggjari skurðviðgerð í knænum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Jón Rói Jacobsen verður neyvan við føroyska fótbóltslandsliðnum í Póllandi um slakar tvær vikur, men í løtuni er óvíst, hvussu álvarsamur nýggi knæskaðin hjá honum er*

Jón Rói Jacobsen bíðar í løtuni eftir at fáa endaliga at vita, hvussu álvarsamur skaðin í knænum hjá honum er. Undir venjing í síðstu viku skeikladist knæið, og síðani hevur tað verið so hovið, at tað ikki hevur borið til at kanna tað neyvt.

– Eg bíði nú eftir at hevilsi leggur seg, og so fara vit at testa stabilitetin í knænum. Tað gera vit við venjingum her í AaB, og í næstu viku hava vit fingið eina tíð hjá einum skurðlækna í Randers, sum eisini skal kanna knæið, sigur Jón Rói Jacobsen

– Beint nú veit eg ikki, um tað er ein minni skaði, ella um tað kann enda við einari nýggjari skurðviðgerð. Eg vóni tað besta, men eg má bíða eftir endaligum boðum, sigur hann.

### Regluligir knæskaðar

Í løtuni er eingin grundaður illgruni um, at krossbandið í knænum er farið, men skaðin er í sama knæið, sum Jón Rói hevði álvarsaman skaða í, og sum hann eisini hevði ein minni skaða í fyrr í ár.

– Um eg kann rokna við at fáa reguligar skaða í hetta knæið, tí tað kanska ikki er nóg stabilt, so kann tað gerast neyðugt við nýggjari skurðviðgerð, men nú fáa vit at síggja, sigur Jón Rói.

Kanningarnar undir venjing síðst í hesi vikuna og hjá skurðlæknanum í Randers í næstu viku, skulu millum annað gera av, um stabiliteturin í knænum er í lagi, og um Jón Rói skal halda fram við at venja og spæla, ella um hann skal leggjast undir skurð.

Í løtuni er tað ikki sannlíkt, at Jón Rói spælir við í landsdystinum hjá Føroyum ímóti Póllandi um slakar tvær vikur.

# NM í boccia verður hildið í Føroyum

ÍSB
*Johan Samuelsen*

Nú fer Ítróttarsambandið fyri Brekað aftur at skipa fyri eini norðurlendskari ítróttarkapping her á landi – fyrstu ferð var kappast í svimjing í NM í svimjihøllini í Gundadali, og var tað í 1987.

Hesaferð er tað í vælumtókta spælinum, boccia, at NM verður í døgunum 12. – 14. mai. Einaferð áður hevur boccia í NM verið í Føroyum, og var tað í 1991.

Boccia er eitt spæl, sum er egnað til øll í orðsins sanna týdningi. Øll kunnu vera við í hesum spæli, sum hevur sín uppruna suðuri við Miðjarðarhavsins strendur.

Kappingin er løgd hesar dagarnar í samband við Dýri biðidagsferiuna, og øll Norðurlond vera umboðað bæði væl og virðiliga. Endaliga luttøkufráboðanin fyriliggur ikki enn, men fyribilsfráboðanir eru komnar og fer samlaða luttakaratalið at liggja nakað omanfyri tey 100 – tá er sjálvandi talan um kappingarungdóm, hjálparfólk og onnur

### Nógv at hugsa um

Talan er um eina stóra kapping, sum krevur nógva orku og fyrireikingar av serligum slagi av einum so lítlum felagsskapi, sum ÍSB. Umframt alt tað ítróttarliga í samband við sjálva kappingina, sum Ingolvur Gunnarson fer at hava høvuðsábyrgdina fyri, so eru so nógv serlig viðurskifti at hugsa um hesar dagar.

T.d. verður talan um einar 20 luttakarar, sum koma higar at dystast, sum sita í koyristólum, bæði manuellum og el-koyristólum, og krevur tílík ferðing við flogførum til Føroya serligar fyriskipanir, t.d. er bert loyvt at hava tveir elstólar í einum flogfari vegna nýggju trygdarreglurnar í alheimshøpi, og tí má ein neyv samskipan gerast við Atlantic, so allir bocciaspælararnir koma rættstundis til kappingina.

Sovorðin stór NM-kapping krevur nógv pláss, og tí er neyðugt at spælt verður í 4 hallum, nevniliga í Hoyvík, á Hálsi, í Gundadalshøllini og í HBF-høllini.

## Dalbúð og Kollsker taptu tepurt

**Tveir 17 ára gamlir føroyskir fótbóltsspælarar vóru í gjár við í finaluni í donsku skúlakappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað gekk akkurát ikki hjá Oura fótbóltsskúlanum, sum fyrrapartin í gjár luttók í finaluni í donsku skúlafótbóltskappingini fyri unglingar. Tveir føroyskir spælarar vóru á liðnum hjá Oure, sum spældi finalu móti Copenhagen West, ið er liðið hjá handilsskúlunum í Ishøj og Tåstrup.

Øssur Dalbúð og Torkil Kollsker ganga á Oure fótbóltsskúlanum, sum liggur uttanfyri Svendborg á Suðurfyn. Skúlin luttekur í skúlakappingini og íheyst kvalifiseraðu teir seg á Fyn til víðari luttøku. Ein annar føroyskur fótbóltsunglingur er á Oure. Hann er eisini sera evnaríkur, og hann hevur verið á Oure liðnum. Tíverri var Pætur Jørgensen, sum er lítli beiggi Bjarna Jørgensen, ið er á FORMULA liðnum hjá Skála, skaddur til endaspælið. Pætur, sum er høgri vongverji, hevur vant við OB, har hann hevur spælt á besta unglingaliðnum.

Mánadagin spældi Oure hálvfinalu móti Laursens Realskole. Øssur Dalbúð var í Oure álopinum, og Torkil Kollsker var í miðverjuni. Oure vann 5-2, og Øssur Dalbúð skoraði tvey av málunum.

Í hinari hálvfinaluni vann Copenhagen West, sum er liðið hjá handilsskúlanum í Ishøj Taastrup, 4-2 á Randers Realskole.

Finalan varð spæld fyrrapartin í gjár, og hon varð send beinleiðis á sjónvarpsrásini Viasat Sport 1.

Eftir vanliga leiktíð - 2 x 40 minuttir - var støðan 1-1, eftir at Oure heilt tíðliga hevði lagt seg framum. Torkil Kollsker var í miðverjuni alla tíðina, og Øssur Dalbúð var í álopinum, inntil tað restaði eitt korter.

Eftir vanligu leiktíðina var spælt tvær ferðir fimm minuttir longd leiktíð, men einki mál kom. Í brotssparkskappingini misnýtti Oure tvær ferðir, meðan Copenhagen West misbrúkti eina ferð og tískil vann finaluna á Vejlby Riskov stadion í Århus.